

# Eitt virðiligt starv

Kaupthing søkir eitt fólk til ráðgeving og kundarøkt innan fyri virðisbrævaøkið.

Tín uppgáva verður at røkja sambandið við okkara viðskiftafólk. Ein umráðandi partur av arbeiðnum er at leggja skilagóðar og lønandi ætlanir fyri teirra íløgur. Umframt at ráðgeva teimum, vit longu samstarva við, skalt tú eisini leita upp hugsandi viðskiftafólk. Vit stremba eftir varandi viðurskiftum við okkara viðskiftafólk, og tí er álit eitt lyklaorð.

Til starvið krevst, at tú ert álitisvekjandi og megnar at skapa virðing um tín persón. Tú ert útvendur og samskiftir lættliga við øll. Tú dugir væl at arbeiða sjálvstøðugt, tær dámar avbjóðingar, og tú hevur lætt við at seta teg inn í nýggj viðurskifti.

Tú hevur eina hóskandi hægri útbúgving og hevur stóran áhuga fyri íløgum í virðisbrøv. Góðar arbeiðsroyndir á økinum eru ein fyrimunur, men als eingin treyt. Enskt dugir tú væl, bæði í skrift og talu.

Vit kunnu bjóða tær eitt avbjóðandi starv á fakliga høgum stigi í einum dynamiskum felagi í støðugari menning. Tú kemur at upplíva ein góðan samstarvsanda í einum spennandi og mennandi umhvørvi, har altjóða møguleikarnir eru góðir.

Lønin verður eftir avtalu. Hevur tú annars okkurt at spyrja um, ert tú vælkomin at venda tær til Peter Holm, stjóra í Kaupthing í Føroyum.

Send eina umsókn innan 15. august til:

Kaupthing
Virðisbrævameklarafelag
Tinghúsvegur 14
Postboks 3090
FO-110 Tórshavn

Kaupthing er leiðandi innan fyri virðisbrævarøkt og vinnutænastur í Føroyum. Felagið røktar ognir fyri virki, stovnar og privatar íleggjarar og er fyrsta virðisbrævameklarafelag í Føroyum. Kaupthing er millum 10 teir størstu bankarnar í Norðurlondum umframt deildir í London, New York, Geneve og Luksemburg. 10 fólk starvast í Kaupting í Føroyum.

www.kaupthing.fo

KAUPTHING
Virðisbrævameklarafelag

www.sansir.fo



## Nýggjur stovnur til fjølbrekað børn

# Rók søkir starvsfólk.

Rók er ein dagstovnur fyri børn undir 18 ár við fjølbreki, har møguleiki eisini er fyri umlætting. Endamálið við Rók er at skapa eitt trygt grundarlag fyri børnini, har tey kenna seg væl, verða vird, eru við í sosialari samveru og fáa eitt mennandi tilboð saman við neyðugu venjingunum.

Endamálið við hesum dagstovni er at royna eina nýggja skipan við einum tilboði, har fjølbrekað børn verða stimbrað og ment, og har ansing, viðgerð og umlætting av fjølbrekaðum børnum verður samantvinnað á einum staði.

Rók er dagstovnur undir Almannastovuni.

**Søkt verður eftir**
Søkt verður eftir starvsfólki til dagstovnin Rók í Saltnesi Vit vænta at tú hevur viðkomandi útbúgving, so sum pedagogur, fysioterapeutur, ergoterapeutur, sjúkrarøktarfrøðingur ella royndir á økinum.

Á stovninum eru 9 børn.

Ætlanin er at taka stovnin í nýtslu 1. september 2005.

Størvini verða sett við einum vikuligum tímatali millum 20 og 40 tímar.

**Vit ynskja**
Okkara ynski er at tú ert virkin og nýhugsandi, hevur góð samstarvsevni og arbeiðir sjálvstøðugt við at loysa uppgávunar í tráð við endamálið hjá stovninum og teir málsetningar stovnurin hevur.

**Í tí dagliga arbeiðnum leggur Rók dent á**

- At hava fyrilit til menningina, aldrinum og tørvinum hjá tí einstaka barninum.
- At tað er gott samband og tilknýti ímillum tað einstaka barnið og starvsfólkið.
- At barnið kennir seg sum ein týdningarmiklan lið í einum sosialum felagsskapi.
- At menna samskifti, sjálvhjálp og sjálvsvirði.
- Tryggleika, umsorgan og nærveru.
- Virksemi, sum hóskar til aldurin og menningina hjá tí einstaka barninum.

**Vit kunnu bjóða**
Eitt áhugavert starv, har tú saman við øðrum fakfólki og hjálparfólkum fært møguleika fyri at byggja upp eitt spennandi pedagogiskt umhvørvi á einum nýggjum stovni.

**Meir fæst at vita**
Nærri upplýsingar um starvið í Rók fáast við at venda sær til: Hanna Juul, leiðari, á telefon 447003.

**Umsóknir**
Skrivlig umsókn skal verða Almannastovuni í hendi í seinasta lagi 15. august 2005 kl. 9.00.
Send umsóknina til:
Almannastovan,
Smyrilsvegur 20,
Postboks 3096,
110 Tórshavn.

almannastovan@almannastovan.fo · www.almannastovan.fo

RÓK almannastovan

KREA.FO · TEL 44 93 39